## Kvøldardystir í oktober

Fótbóltssambandið hevur nú fingið upplýst klokkutíðirnar, har føroyska fótbóltslandsliðið í næstum skal spæla móti Fraklandi og Rumenia. Á Stade Municipal de Roudourou í Guingamp í Fraklandi verður dysturin tann 10. oktober blástur ígongd klokkan 20 okkara tíð. Fýra dagar seinni verður spælt á Ceahlaul Stadium í Piatra Meamt í Rumenia, og tá byrjar dysturin klokkan 18.30 okkarar tíð.



## Holst á vikuliðið

Danska BT hevur hvørja viku sína meting av einstøku spælarunum í donsku SAS-liguni, og ikki heilt óvæntað er Silkeborg væl umboðað hesaferð, eftir at uppflytararnir smurdu Brøndby av. Ikki færri enn fimm av spælarunum hjá Silkeborg fáa toppkarakter, og sambært BT er Christian Lamhauge Holst tann besti av øllum hesum. Føroyski landsliðsspælarin skeyt tvey av málunum hjá Silkeborg, harav tað seinna var ein sonn perla, tá hann frekt hælaði bóltin í neti til 4-0.

## Góð reklama fyri kvinnufótbóltin

Liðformaðurin á tíggjufalda meistaraliðnum hjá KÍ, Malena Josephsen, helt avgerandi dystin ímóti AB vísa føroyskan kvinnufótbólt frá síni bestu síðu.

– Tað var avgjørt rætt at útseta dystin, tí nú fingu vit at síggja gott fótbóltsspæl frá báðum liðum, og eg haldi, at hetta var góð reklama fyri kvinnufótbóltin, segði hon.

– Eg hevði væntað ein sera torføran dyst, men visti tað, at fingu vit eitt mál, so fóru vit eisini at fáa fleiri.

Malena, sum er ein av teimum, ið hevur verið við til at vunnið allar hesar tíggju ferðirnar á rað, ásannaði eftir dystin í gjárkvøldið, at tað er bara gott fyri kappingina, at onnur enn KÍ eru um boðið.

– Tað er í øllum førum stuttligari fyri hini liðini, at tey kunnu bjóða okkum av. Og so er tað sjálvandi eisini gott fyri føroyskan kvinnufótbólt, sjálvt um vit halda tað vera líka stuttligt at vinna nógv, segði hon.

– Áðrenn vit byrjaðu hesa røðina upp á tíggju meistaraheiti, taptu vit alt. Men so tóku vit okkum saman og hava vunnið síðani, so tað er bara at trúgva upp á tað, um onkur ætlar at bjóða okkum av.

**hil**



## Rutinan gjørdi munin

**– Hóast kappingin ikki á hvørjum ári hevur verið líka stór, sum hon hevur verið tað í ár, so er altíð nógv trýst á okkum, tí øll vænta, at vit skulu vinna, sigur Rannvá Andreasen, ið er ein av teimum, ið hevur verið við til at vunnið hesi tíggju meistaraheitini á rað**



einslistir@kallnet.fo

**Hilmar Jan Hansen**

Tað skerst ikki burtur, at langa sigursrøðin hjá KÍ-kvinnunum er merkisverd, og tað eru heldur ikki mong lið úti í heimi, ið megna at gerast meistarar heilar tíggju ferðir á rað. Onnur lið hava roynt at bjóða av – B36 fyri tveimum árum síðani og AB í ár – men kortini er ikki eydnast nøkrum av hinum at koppa KÍ av trúnuni.

– Sjálvandi er tað stuttligari, tá vit fáa kapping, og í ár hevur tað verið øgiliga stuttligt at spælt. Fleiri dystir hava verið tættir, hóast vit í dag smurdu AB av, og eisini onkrir aðrir dystir hava eisini verið tættir. Men tað er líka stuttligt at vinna hvørt ár, tí vit verða eyka uppsettar. Nógv trýst er á okkum, tí øll vænta, at vit vinna, segði Rannvá Andreasen, ið skoraði eitt av málunum ímóti AB og legði upp til tvey.

### Fleiri fáa hug

– At onnur bjóða av, ger vónandi, at fleiri gentur fáa hug at spæla, men eg vænti allíkavæl, at vit fara at vinna í nøkur ár aftrat, tí vit hava eitt so sterkt lið og fara at fáa nakrar spælarar upp av teimum yngru. Men vit síggja, at eitt nú Skála hevur bygt eitt gott lið upp og at Víkingur hevur jú verið við í fleiri ár, umframt at AB eisini í yngru deildunum hevur verið á veg.

Avgerandi dysturin ímóti AB var fyrst settur í gongd sunnudagin, men blástur av, tá eitt korter var farið. Men nú spælast skuldi fyri aðru ferð í gjárkvøldið, vísti KÍ seg at hava munin væl og virðiliga.

– Eg haldi, at rutinan hevði nógv at siga og at hon kanska var munurin á liðunum. Vit skuldu jú spæla fyrst í gjár og so aftur í ár, og tað er strævið at seta seg upp til tveir dystir við bara einum degi ímillum, segði Rannvá Andreasen.

– Í gjár vóru vit kanska eitt sindur meira anspentar, men í dag vóru vit meira róligar, og tá vit so komu á odda 1-0, gekk tað bara ein veg.

# KÍ aftur og aftur og aftur

**Tá avgerandi dysturin um føroyameistaraheitið hjá kvinnunum varð spældur av nýggjum í gjárkvøldið, eydnaðist ongantíð AB at hótta KÍ, sum vann ein óvæntað tryggan sigur og tí kundi tryggjað sær tíggjunda meistaraheitið á rað**



einslistir@kallnet.fo

**Hilmar Jan Hansen**



**Tá mest stóð á, vístu KÍ-kvinnurnar seg frá síni sterkastu síðu. Við sannførandi 4-0 lótu tær ongan iva vera um, at FM-steypið fyri 10. ferð á rað skal til Klaksvíkar**

Mynd: Terji S. Johansen

Fleiri av klaksvíkingunum, sum annan dagin á rað vóru komnir at hyggja á Argjum, kundu í gjárkvøldið fara til hús í munandi betri hýri enn sunnudagin. Tá endaði dysturin um meistaraheitið hjá kvinnunum við avlýsing og yvirlivilsisdysturin hjá monnunum við tapi. Men í gjárkvøldið vann KÍ, og kvinnurnar, sum í mong ár hava verið stoltleikin hjá KÍ, leveraðu enn eina ferð vøruna.

Tað, at KÍ síðani 2000 hevur vunnið øll meistaraheitini, umframt steypakappingina sjey ferðir, kann so bara vera øllum øðrum til fyridømi, tí hetta er óhoyrt í føroyskum høpi, umframt at leitast skal væl út um landoddarnar, áðrenn nakað tilsvarandi verður funnið. Hetta er bæði eitt roysni og eitt bragd.

Øll hesi árini eru tað bara einstøk lið, ið hava megnað at givið KÍ kapping, og tí kann kappingin viðhvørt tykjast heldur lítið áhugaverd fyri fjøldina, men tað kann so einki taka frá KÍ-kvinnunun, ið veruliga hava verið uppsettar hvørt ár og hava tikið uppgávuna í størsta álvara. Tær hava stríðst fyri sakini og gjørt sítt, og so kunnu tær annars ikki gera við, at onnur ikki megna tað sama.

### Ása gekk undan

Í ár hevur tað verið AB, ið hevur bitið frá sær, og við steypasigrinum í juli mánaði fingu kvinnurnar á Argjum eisini víst, at tær kunnu gera tað. Í teimum trimum landskappingardystunum, sum høvdu verið millum liðini undan dystinum í gjárkvøldið, høvdu liðini vunnið hvør sína ferð 1-0 á hvørjum øðrum og spælt eina ferð javnt, 1-1.

Tí var stórur spenningur undan dystinum inni í Vika, nú hann fyri aðru ferð skuldi blásast í gongd, eftir at hann sunnudagin var avlýstur fyri veður eftir spæl í eitt korter. Men hóast AB legði bragdliga fyri ta allarfyrstu løtuna, skuldi tað vísa seg, at KÍ hevði eina styrki, AB ongantíð fekk matsjað ordiliga í hesum dystinum.

Eftir fyrstu løtuna, har KÍ-kvinnurnar høvdu eitt sindur ilt við at fóta sær, komu tær kortini fyri seg og settu seg spakuliga á dystin. Men tað var ikki, fyrr enn hol kom á 19 minuttir inn í fyrra hálvleik, at tað av álvara fór at ganga tann vegin. Rannvá Andreasen sendi bóltin høgt innfyri úr vinstru síðu, og inni á fimmmetrinum setti Ása K. Thomsen høvdið á, og so var 1-0 til KÍ.

Átta minuttir seinni var tað aftur Rannvá, sum legði upp, og hesa ferð vísti Ása síni bestu kynstur, tá hon við aftaru stong sera vakurt skallaði bóltin yvir í hin málkrókin til 2-0. Nú byrjaði at koma til sjóndar, hvønn veg hesin dysturin kundi fara, tí KÍ-kvinnurnar vóru nógv grammari og meira ágangandi, tá tær nærkaðust málinum.

### KÍ størri álop

KÍ spældi við Ásu K. Thomsen og Vivian Bjartalíð á hvør sínum vongi og Sofíu Purkhús í álopinum, men tær báðar úti í síðunum vóru sera ágrýtnar at koma fram og bjóða seg til, so í veruleikanum spældi KÍ fyri tað nógva við trimum framherjum, og tað gav fleiri ferðir AB-verjuni trupulleikar.

Í hinum endanum hevði AB bara Monu Breckmann har frammi, og hóast hon í fyrra hálvleiki fleiri ferðir fekk góða hjálp frá Lisu í Liða, ið